## DAGSINS MEINING

# Óli P.

Í dag 24. januar 2006 verður Óli Petersen sjeyti ár. Óli hevur nú í mong ár teknað her í blaðnum og vit nýta høvið at ynskja honum hjartaliga tillukku. Óli er sermerktur sum listamaður. Ja, hann er so sermerktur, at vit í grundini ikki hava orð á føroyskum fyri hansara sermerktu list. Tað, ið hann letur frá sínum penni er *humor* og *satira* - í orðabókini umsett til skemt og speisemi. Hesi orð lýsa ikki rættiliga tað, sum Óli ímyndar, sum júst er humor og satira. Men vit vilja so fyri góðan ordans skuld nýta skemt og speisemi. Hansara øki er karikaturin, oftast ein sera vinarlig men tó avskeplað og skemtilig mynd av veruleikanum.

Blaðteknarar, teir sum nýta karikaturin, eru samfelgsins eygleiðarar og viðmerkjarar. Óli er meistarin á hesum øki. Hann kennir fyrr enn nakar annar øll rák í øllum teimum umhvørvum har maktmenniskjuni ferðast og maktstrukturarnir blóma. Hetta er uttan mun til um talan er um politik, átrúnað ella vinnulív. Óli dugir betur enn nakar blaðmaður ella politiskur viðmerkjari at lýsa kjarnuna í einum máli ella eini hvørji støðu. Við at lýsa kjarnuna er hann oftast ómetaliga beinrakin og kemur samstundis sannleikanum nærri enn hann kanska sjálvur er greiður yvir. Hann røntgenavmyndar tað uppblásta og óektaða og ger tað láturligt. Tað er ikki stuttligt at vera fyri, hevur mangur ásannað. Óli P. minnir sostatt eitt sindur um barnið í ævintýrinum *Nýggi búni keisarans* hjá H.C. Andersen.

Óli P. er eitt natúrtalent av teimum heilt sjáldsomu, og vit ynskja øll, at hann framyvir ansar væl eftir hesum talenti. Óli er framum alt stuttligur, men hann kann samstundis vera hvassur serstakliga, tá ið hann avmyndar hykl ella maktmenniskju, ið gera sær dælt av teimum mongu viðbreknu og verjuleysu skipanum í okkara lítla samfelag. Hetta kemur eisini til sjóndar, tá hann avmyndar fylgjurnar av skeivum ella illa umhugsaðum politiskum avgerðum. Hvør minnist ikki tekningina *Vaktarskifti á Landsjúkrahúsinum*. Hon er klassikarin í eini langari røð av hesum slagi av tekningum, ið avmynda tápuligar politiskar avgerðir, sum ongantíð skuldi verið tiknar - groteskar, rámandi, stuttligar og samstundis ikki sørt óhugnaligar tekningar, ið vit kortini ikki vildu verið fyri uttan.

Samfelagið er lítið, øll kenna øll og sera torført er mangan at kalla tingini við teirra røttu nøvnum uttan at hetta fær óhepnar fylgjur bæði á ein og annan hátt. Men Óli dugir hetta kynstrið at siga tað, sum onkur má siga - at seta orð á tað, sum ikki eigur at verða tagt burtur ella bara sleppur at fara aftur við borðinum. Hann hevur sagt meira um føroyska samfelagið enn fleiri doktararitgerðir tilsamans hava megnað. Jú víst kann Óli vera hvassur, men hann er samstundis heilt ómetaliga stuttligur. Hansara sublima humor og hansara geniala satira gera, at fá fólk taka sær tikni av skemtinum og oftast er hann hóast alt tann mildi. Listafólk, sum Óli gera okkum gerandisdagin lættari. Einki er so sunt fyri okkum menniskju sum at flenna, siga læknarnir. Óli fær okkum at flenna at teimum, sum tola tað. Hann fer ongantíð eftir tí veika ella eftir honum, sum liggur niðri, tí hann er sannur humanistur og hevur einki av tí misantropiska, ein við hvørt finnur hjá karikaturteknarum. Óli P. er ein sannur humoristur og satirikari í altjóða klassa. Føroyingar eru vorðnir góðir við Óla og hava tikið hann til síni hjørtu. Vit ynskja hjartaliga tillukku og gleða okkum til nógvar skemtiligar tekningar komandi árini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eingin kann taka meiningarnar frá mær!

**GERHARD LOGNBERG**
Løgtingsmaður



**– Teir vaknaðu við kaldan dreym og gjørdu mína grein til stórpolitikk – og gloyma tann veruliga politikkin, skrivar Gerhard Lognberg**

Eg má nokk siga, at jólini hava gjørt okkum tingmenn, og tey sum mettu seg nær tingsessi hjá Javnaðarflokkinum, dovin og sløv.

Jóanes Eidesgaard, løgmaður hevur verið sáblaður niður um allar grensur ósakliga, men tinglimir floksins og teir og tey, sum næstan vunnu sær sess, ikki hava lætt lítlafingur, men kanska hava hugsað sum so, hatta má løgmaður sjálvur um.

Eg skrivaði eina grein fyri at vísa á, at okkara løgmaður hevði annað uppiborið enn at verða húðflettur av Høgna Hoydal.

Í dag fekk eg svar frá Høgna Hoydal, og hevði eg væntað tað.

So eg ætlaði at svara Høgna so væl eg kundi. Høgni hevur hvassan penn, og er journalistur haldi eg. So komi eg, neyðars maður við míni rørleggjaraútbúgving, men eg royni at halda meg framat. Havi fingið so frætt í vøggugávu, at mær dámar pennin, tá eg siti einsamallur og droymi meg vekk.

Men hvat var tað sum nú hendi. Eg eri í fastatøkum við Høgna Hoydal. Ja, eg skal verja meg sum best. Mitt sum vit dystast, so hoyri eg korunar og svørini glinta stál ímóti stálið.

Nú havi eg mínar egnu í rygginum. Fremstur stendur hann, Bergur P. Dam, og vil jarðleggja Sandoyar tingmannin. Næst ríður hin tiltikna flokstrúgva javnaðarkvinnan Helena á Neystabø og lovar bál og brand yvir henda løgtingslim úr Sandoynni, sum ikki tekur við hennara ráðum.

John Johannessen vil ikki siga dómin soleiðis beint fram, men bíðar til høvdið á Gerhard verður víst fram á silvurfatið.

Síðani ríður annar fram, sum er heldur sprelkin. Hann er ikki í Javnaðarfloks skaranum, men hevur eisini tikið koruna fram. Er er hin navnframi vinmaður mín, Bill Justinusen. Hann vil einki kennast við henda ekstremistin úr Skopun og metir, at rættast var, at hann bleiv fastsettur fyri at forfylgja teimum samkyndu.

Jú, nú stendur á gomlum nøglum. Nú skal skil koma á. Gerhard skal vigast í flokkinum og helst tveitast út í kuldan, tí hann skal ikki prøva upp á at siga sína hugsan.

Pápi mín, sum kundi verða nakað uppfarandi, men skjótt blíður aftur, plagdi at siga við mammu mína, »Jóhanna, hatta Hornstrossið av Sandi blandað við treiksni úr Skúvoy fái eg aldrin bilbukt á.«

Sjálvur meti eg meg verða vælsignaðan við nakað av hesum, so tað verður ringt hjá Bergi Dam, at siga Gerhard hvat hann skal siga.

Eg bað í míni grein ongan misskilja meg við vilja, tað er nú gjørt væl og virðuliga.

Tá tað verður sagt, at eg skal taka orðini aftur, so verður tað ikki gjørt. Hvat við øðrum í flokkinum, sum hava úttalað seg í ríkiligt mát mótsat mínum meiningum?

Um so skuldi verið, at flokkurin vildi av við meg, so havi eg einki val. Men eg trúgvi, at nógv fólk í okkara kristna landi eru samd við mær. Eg veit, hvat ið eg standi inni fyri, og tað skal eingin taka frá mær. Hvørja fer eg havi meiningar, ja so reagera fólk úr flokkinum ímóti mær.

Eg hevði ikki verið nógvar dagar í flokkinum, áðrenn fyrsta yvirlýsingin var bæði í bløðunum og útvarpinum frá flokkinum.

Eg má nokk siga, at ikki havi eg havt tað stóru verjuna í Bergi P. Dam. Hann hevur altíð hartað meg, og vóni eg ikki, at eg komi fyri tað vanlagnu, at eg fari at venda mínum egnu sjónarmiðum bakið, og fari at elta Bergi í hansara hugsanum.

Tær hava so ikki rokkið higartil fyri at fáa sæti á tingi. So neyvan hava veljararnir í høvðustaðnum hildið hansara meiningar verið tær bestu. Men kanska nú fer at bragda, nú hann hevur hyggjuráðini at varpa Gerhard út úr Javnaðarflokkinum.

Eg eri so bláoygdur, at eg haldi meg hava tænt Javnaðarflokkinum líka væl sum Bergur P. Dam.

John Johannesen og eg hava oftani verði ósamdir um hesi viðurskifti, og verður sagt, at flokkurin noyðist at leggja ein linju í teimum etisku málunum. Um tað er ætlanin hjá Bergi, John og Helenu, at eg skal fáa munnkurv, so fara tit heilt skeiv. Tað sum eg standi inni fyri, komi eg ongantíð at siga tilskammar við, tað lyfti eigi eg.

Løgmaður er meiri sakligur í síni talu. Vísur á frælsið í flokkinum, sjálvt um hann slettis ikki er samdur við mær, tað góðtakið eg fult út.

Eg noyðist at enda við úttalilsinum hjá Bill Justinussen. Ja Bill, hvat skal eg siga. Jú tú er ikki samdur við hesum ekstrema javnaðartingmanninum. Jú men, hví skuldi tú verði samdur við mær, helst havi eg verið so innbilskur, at vit vóru samdir.

Men tá eg læs gomlu Dimmu, kundi eg síggja, at ein av mínum harðastu mótstøðumonnum er júst tú Bill. Tað ørkymlar meg, mann kann skjótt fella fyri freistingini, ella møguliga ikki rætt siteraður? Tað kundi meiri enn so komið fyri?

Men sum eg skilji á úttalilsinum, so eri eg borin til altarið, klárur at ofra. Tað verður so ein avgerð, sum onnur enn eg skal taka.

Men mínar meiningar, tær kann so í hvørfall ongin taka frá mær.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.